

Finn Johannesen, nýggjur nevndarlimur í Íverksetarahúsinum, Kitty May Ellefsen, forkvinna og Hilmar Sam Lamhauge, nevndarlimur

# Finn Johannesen nevndina í Íverksetarahúsinum

ÍVERKSETAN
*Tíindaskriv*

Vinnumálaráðið hevur valt nýggjan nevndarlim í nevndina hjá Íverksetarahúsinum. Talan er um Finn Jóhannesen, sum er ættaður úr Klaksvík, men búsitandi í Suðuroy. Finn er íverkseti við Stóra Í. Hann eigur og rekur Vilt í Suðuroy. Eisini rekur hann heilsøluvirksemi.

Íverksetarahúsið eigur virknan lut í at tryggja eina samanhangandi íverksetaraskipan og er ábyrgdarhavari í fleiri átøkum hjá landsstýrinum at menna hesa. Millum annað kann nevnast, at fáa undirvísingarverkið at gerast ein meira virkin partur at ala fram íverksetarahugburð.

- Finn Jóhannesen er ein fongur hjá Íverksetarahúsinum. Hann er ein eldsál, sum fer at gera stóran mun hjá okkum. Vit fegnast um, at sleppa at arbeiða saman við Finn um íverksetan í Føroyum, sigur Kitty May Ellefsen nevndarforkvinna.

Hinir nevndarlimirnir í Íverksetarahúsinum eru Kitty May Ellefsen, nevndarforkvinna og Hilmar Sam Lamhauge. Rani Nølsøe er stjóri.

# Vinarbýir í Klaksvík á skúlasamstarvsfundi

**Klaksvík er partur av einum virknum skúlasamstarvi við vinarbýir sínar, Sisimiut, Kópavog, Odense, Tróndheim, Norrkøping og Tampere**



SAMSTARV
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í hesum døgum eru umboð fyri vinarbýir Klaksvíkar á vitjan í sambandi við fund í skúlasamstarvinum, sum Klaksvík hesaferð er vertur fyri.

Klaksvíkar býráð sigur í tíðindaskrivi, at hetta samstarvið, sum varð sett á stovn í 1995, er partur av vinabýasamstarvinum millum hesar kommunur. Samstarvsavtalan hevur heitið "Nordisk Platform", har ásett er, hvussu samstarvað verður um útbúgving, mentan, vinnulív og umhvørvi í vinarbýarhøpi.

Í tráð við hesa avtalu hevur síðani 1996 verið eitt virkið samstarv millum fólkaskúlar í vinarbýunum. Skúlastjórar hittast regluliga, sama gera lærarar, og so er eisini avtala gjørd um setursskúlar, ið skifta millum vinarbýirnar hvørt ár. Talan er um 8. flokkar, ein úr hvørjum vinarbýi, sum hittast. Í ár hevur Norrkøping boðið inn til setursskúla 20. – 24. sept. 2010.

Samskiparar í skúlahøpi hava í vikuni havt fundir í Klaksvík, har ætlan nú er løgd fyri víðari samstarvið 3 ár fram. Eisini er avtalað, hvørji málsøki samstarvið skal snúgva seg um næstu árini. Her er avrátt, at leggja seg á, hvussu tilber at eggja til lesing og góðar lesivanar hjá børnunum í øllum lærugreinum.

Við á fundinum hesaferð vóru Knud Jensen úr Odense, Boel Johnsson frá Norrkøping og Rannvá Joensen úr Klaksvík.

Gestirnir fingu eisini høvi at síggja seg um í Klaksvík. Tey sóu Vevskúlan, Kokka- og Sjómansskúlan, Húsarhaldsskúlan, Serskúlan, Dávavirkið, egningaskúrarnar á Stongunum, nýggja Skúlan við Ósánna og ymist annað. Tey vóru eisini umborð á Norðborg, sum hugtók tey nógv.

Gestirnir, sum eisini fingu høvi at heilsa upp á borgarstjóran, formannin í Mentanarnevndini, mentanarleiðaran, og báðar skúlastjórarnar, fóru avstaðaftur mikudagin 10. mars 2010.

Áarstova

12 og 13 marts
Upplatingartilboð
5 Rættir
við víni og øli
Einans 650,- pr kuvert.
Tlf. 33 30 00

Úr Áarstovu komu Áarstovubrøðurnir. Mætu skald okkara, Janus og Hans Andrias Djurhuus, vóru bornir í heim í tí lítla og eyðmjúka húsinum, sum krøkti seg fast millum Havnará og Áarvegin,í gomlu Havnini.

Veik og vesæl lá Áarstova sum næsti granni undir Amtmansborgini, men inni birtist skaldskapurin og tónleikurin. Áarstova var savningarstaðurin hjá teimum ungu havnarmonnunum, sum brendu fyri listini seinast í 19. øld. Har komu Geilabrøðurnir á gátt, Bakar Hansen, sum birti undir eitt blómandi tónleikatíðarskeið, og ungi skúlalærarin Christian Ludvig Johannessen.

Úr Áarstovu høvdu Janus og Hans Andrias stutt inn til farbróðurin Dia á Vertshúsinum, sum átti Hotel Djurhuus.

Áarstova er ikki longur. Húsið er burtur, men týdningurin stendur eftir.

Áarstova í dag er reist úr søgunum, minninum og stóra týdninginum, sum teir tríggir Dia, Janus og Hans Andrias Djurhuus høvdu fyri Havnina og hava fyri Føroyar í dag.

Vertshúsið og Hotel Djurhuus var savningarstað í Havnini í teimum døgum. Tann tíðindafróði Dia á Vertshúsinum segði søgur og skrøggaði um stóru verð. Hann var miðdepilin, sum dró fólk úr øllum samfelagnum og úr øllum londum til sín.

Har varð skift orð um mentanarviðurskifti og politik, har var rúm fyri øllum. Søgurnar siga um skotskar lordar, hálendskar greivar og íslendskar flytifuglar, men eisini um vanliga føroyingin, sum var drigin at Dia og søgunum uttan úr heimi.

Saman við Áarstovu var Vertshúsið, Knútsstova og Hotel Djurhuus staðið har alheimurin rann saman við tí heimliga, eitt frírúm har mentanarlív, tónleikur, skaldskapur, politikkur og gerandislív vuksu saman í eina hægri eind, og har býur og bygdin funnu saman.

Vit vita, at íblásturin og andin frá teimum, sum undan fóru, enn livir.

Vón okkara er at Áarstova skal gerast savningarstaðurin einaferð enn



Áarstova
ein biti av mentan